# Útboð eftir Outsystems mennarum

- Til menning av nýggjum kt-skipanum hjá barsilsgrunninum

## Innihald


Inngangur ........ 2
Uppgávan ........ 2
Krøv og treytir til rammusáttmálan ........ 2
Minstakrav til ráðgevar ........ 3
Sundurgreinaðir tímaprísir ........ 3
Krøv til tilboðið ........ 3
Vekting av tilboði ........ 4
Vekting av tilboði verður útroknað soleiðis ........ 4
Góðska ........ 4
Tímaprísir ........ 4
Dømi um útrokning: ........ 5
Innlating og tíðargongd ........ 6

## Inngangur

Við hesum útboðið ynskir TAKS  at gera avtalu um samstarv við ein ella fleiri veitarar. Endamálið er at menna nýggj brúkaramarkamót til fakskipan hjá Barsilsgrunninum og talgildar sjálvgreiðslur, soleiðis at bæði borgari og vinna kunnu avgreiða øll barsilsviðurskifti talgilt.

Væntandi endar útboðið við einum menningarrammusáttmála millum partarnar, sum er grundaður á tíð og góðsku.

***Útboðið er treytað av, at Føroya Løgting samtykkir verklagslóg um verkætlanina. Tí skulu øll tilboð verða galdandi í minst 3 mánaðir eftir seinastu innlatingarfreist.***

## Uppgávan

Yvir tey næstu árini ætlar TAKS at dagføra og menna nýggj markamót í Outsystems til gomlu 3270-skipanina, sum verður brúkt í dag.

Nýggjar og betri arbeiðsgongdir skulu mennast og verksetast í verandi Outsystems umsitingarskipan hjá TAKS. Hagtals- og simuleringsamboð skulu eisini mennast til somu skipan.

Ein talgild sjálvgreiðsla til borgaran skal nýmennast við tilhoyrandi dátugrunni. Hettar fer at økja um sjálvvirkni í t.d. umsóknartilgongdini.

Outsystems-skipanirnar við tilhoyrandi dátugrunni fara at integrera við aftanfyriliggjandi fakskipan hjá Barsilsgrunninum, Vinnuglugganum, Samleikanum og møguliga aðrar KT-skipanir umvegis Heldina.

Menningin í verkætlanini verður gjørd í tvørvirkisførum toymi undir leiðslu av TAKS.
Tí er ynskiligt at knýta 2 ella fleiri Outsystems-mennarar at toyminum.

Toymið verður sett saman av starvsfólkum frá fleiri organisatiónum, og fer at arbeiða saman í tøttum samskifti við hvønn annan. Fyri at tryggja effektivt samstarv og framgongd kann tað til tíðir verða neyðugt, at toymið arbeiðir saman á sama staði.

Vit arbeiða agilt, tí TAKS ynskir eina verkætlan við stuttum sprintum og leypandi sleppingum. Tí er neyðugt at skapa tætt samstarv millum allar luttakandi partar.

## Krøv og treytir til rammusáttmálan

Við atliti at arbeiðsorku, kostnað og arbeiðssetningi kann støddin á menningartoyminum broytast yvir tíð. Tí verður í hesum útboði lagt upp til ein rammusáttmála, ið skal verða grundarlag undir einum longri samstarvið.

Samstarvið væntast at røkka yvir eitt tvey ára tíðarskeið, tá uppgávan væntandi er loyst, men serstøku menningaruppgávurnar verða leypandi avtalaðar ímillum partarnar. Somuleiðis verður mongdin av tímum avtalað og lagað til av TAKS og veitaranum, so hvørt sum verkætlanin líður.

Tað er ikki eitt krav, at veitarin er føroyskur.

Tað er ein fyrimunur, um veitarin hevur eina rímuliga stødd, soleiðis at TAKS kennir seg tryggan í, at veitarin er førur fyri at nøkta tørvin á arbeiðsorku leypandi.

Sáttmáli verður gjørdur við ein ella fleiri veitarar, ið megna at bjóða tveir ella fleiri mennarar, sum eru certifiseraðir í Outsystems.

TAKS virkar til eitt uppskot um sáttmála við vinnandi veitara.

Væntandi byrjar uppgávan primo 2024. Arbeiðsorkan fer væntandi at svara til eitt fulltíðarstarv frá verkætlanarbyrjan til endan av 2025. Talan kann verða um eykaveitingar undir sama sáttmála.

Uppgávan verður loyst í tøttum samskifti millum partarnar, og til tíðir møguliga hjá TAKS, Smyrilsvegur 20, Tórshavn, í vanligari arbeiðstíð.

## Minstakrav til ráðgevar

Tað er eitt krav, at mennarar, ið veitarin bjóðar, hava viðkomandi útbúgving í systemmenning.

Tað er eitt krav, at allir mennarar, ið skulu arbeiða undir hesum sáttmála, eru certifiseraðir til at menna á Outsystems-platforminum.

## Sundurgreinaðir tímaprísir

TAKS ynskir at arbeiða við sundurgreinaðum tímaprísum út frá royndum, førleikum og útbúgving hjá einstøku mennarunum.

Tí skal tilboð gevast uppá hesar leiklutir við sundurgreinaðum tímaprísum:

| Leiklutur | Týdningur |
|---|---|
| Senior Outsystems-mennari | Systemmennari við minst 3 ára royndum við menning á Outsystems-platforminum.<br>Certifiseraður í Outsystems. |
| Outsystems-mennari | Mennari við KT-útbúgving frá hægri lestri og minst 3 ára royndum við menning í øðrum teknologium t.d. #C<br>Certifiseraður í Outsystems. |
| Junior Outsystems-mennari | Mennari við ongari ella stuttari KT-útbúgving og undir 3 ára royndum við menning.<br>Certifiseraður í Outsystems. |

Loyvt er at leggja tímaprísir afturat uppá leiklutir, ið veitarin væntar kunnu gera seg galdandi seinni í hesum samstarvi. Hesir eru tó ikki við í príssamanberingini, men kunnu ávirka góðskumetingina.

Fyri at tilboðsgevar skulu hava somu fortreytir at geva tilboð eftir, skulu tímaprísir byggjast á effektivta tíðarnýtslu. Effektiv tíðarnýtsla er í hesum útboði sett at verða 7 tímar um dagin, svarandi til 35 tímar um vikuna.

Væntað verður, at talan er um minst 1000 tímar um árið ella í miðal áleið 100 tímar um mánaðin, tá frítíð og heilidagar eru trekt frá.

Árliga tímatalið kann vísa seg at verða hægri enn væntað. Tí kann veitarin velja at áseta tímatal, ið førir til mongdaravsláttur. Hettar verður eisini tikið við í heildarmetingina av veitaranum sum samstarvspartnara.

# Krøv til tilboðið

1. Frágreiðing um bakgrund veitarans fyri at verða partur av hesum samstarvið, og royndir við menning av loysnum í Outsystems ella líknandi platformum.
2. Navn og v-tal hjá veitaranum.

3. Navn og CV hjá mennarum, veitarin bjóðar fram, umframt frágreiðing um teirra royndir við líknandi verkætlanum/uppgávum. Eftir avtalu við veitaran/mennaran tilskilar TAKS sær rætt til at seta seg í samband við fyrrverandi arbeiðsgevarar og kundar fyri at fáa viðmæli um mennaran.
4. Tímaprísir, sum byggja á effektiva tíðarnýtslu.
5. Tal av tímum, sum ið minsta lagi skulu veitast hvønn mðr. og ár undir hesum sáttmála.
6. Tilboðið skal verða galdandi í minsta lagi 3 mðr. eftir seinastu innlatingarfreist.

TAKS tilskilar sær rætt til ikki at velja eitt av innkomnu tilboðunum. Eitt nú um mett verður, at einki av tilboðunum livir upp til settu krøv ella at tilboðini eru ov høg.

TAKS tilskilar sær somuleiðis rættin til at velja meira enn eitt av innkomnu tilboðunum. Eitt nú um mett verður, at ynsktu førleikarnir røkkast best við at samanseta mennarar frá fleiri veitarum.

# Vekting av tilboði

Innkomnu tilboðini, ið liva upp til krøvini í útboðnum, verða vektað í mun til góðsku og prís.

Góðska 50% Tað verður jaligt vektað, hevur veitari og mennari royndir við menning í Outsystems.

Tímaprísur 50% Tímaprísurin er vektaðið tímarprísurin, ið er bygdur á effektiva tíðarnýtslu.

## Vekting av tilboði verður útroknað soleiðis

### Góðska

Við støði í eini samlaðari meting av niðanfyristandandi, fær tilboðið stig á einum skala á 1-50, har 50 er hægst.

- Veitarans førleika til longri samstarv
- Veitarans royndir við systemmenning sum heild
- Veitarans vitan og royndir við Outsystems
- Útbúgving og royndir við systemmenning sum heild hjá mennarunum, sum eru partur av tilboðnum
- Útbúgving og royndir við menning í Outsystems hjá mennarunum, sum eru partur av tilboðnum
- Veitarans førleikar fyri at stuðla arbeiðinum við aðrari arbeiðsorku enn mennarum.
- Veitarans tilboð um møguligan mongdaravsláttur verður árligt tímatal hægri enn mett.

### Tímaprísir

Vektaður tímaprísur verður útroknaður við fylgjandi vekting:

| | |
|---|---|
| Senior Outsystems-mennari | 30% |
| Outsystems-mennari | 50% |
| Junior Outsystems-mennari | 20% |

Tilboðið við lægst vektaða tímaprísi fær 50 stig.

Hini tilboðini fáa stig eftir fylgjandi útrokning:

Vektaður tímaprísur = (tilboð við lægsta vektaða tímaprísi / vektaða tímaprís í tilboðnum, ið mett verður) x 50

## Dømi um útrokning:

**Góðska**

*Tilboð 1*: Hesin veitari fær lægsta stigatal, tí mennararnir ikki hava serliga nógvar royndir og útbúgving, og veitarin verður mettur at hava ein veikan bygnað. Tilboðið fær 30 stig.

*Tilboð 2*: Hesin veitari fær miðal stigatal, tí royndir, útbúgving og bygnaður hjá veitaranum verður tilsamans mett at vera miðalgott støði. Tilboðið fær 35 stig.

*Tilboð 3:* Hesin veitari fær hægsta stigatal, tí mennararnir hava bestu útbúgvingar og royndir og bygnaður mettur at vera sterkur. Tilboði fær 40 stig.

**Prísir**

*Tilboð 1*: Næst lægsta tilboð bjóðar ein vektaðan tímaprís á 710 kr./t. Hettar gevur (690/710) x 50 = 48,6 stig.

*Tilboð 2*: Tilboð við lægst vektaða tímaprísi er 690 kr./t. Hettar gevur 50 stig.

*Tilboð 3:* Trið lægsta tilboð bjóðar ein vektaðan tímaprís á 810 kr./t. Hettar gevur (690/810) x 50 = 42,6 stig.

| | **Tilbud 1** | **Tilbud 2** | **Tilbud 3** |
|---|---:|---:|---:|
| Senior outsystems udvikler | 800,00 | 1000,00 | 1200,00 |
| Outsystems udvikler | 700,00 | 600,00 | 700,00 |
| Junior outsystems udvikler | 600,00 | 450,00 | 500,00 |
| **Vægtet timepris** | **710,00** | **690,00** | **810,00** |
| | | | |
| Kvalitetsvurdering | 30,0 | 35,0 | 40,0 |
| Vægtet timepris | 48,6 | 50,0 | 42,6 |
| **Samlet vurdering** | **78,6** | **85,0** | **82,6** |

**Samlað meting**

Tilboð 1: Góðska 30 stig + vektaður tímaprísur 48,6 stig = samlað meting 78,6 stig.

Tilboð 2: Góðska 35 stig + vektaður tímaprísur 50 stig = samlað meting 85,0 stig.

Tilboð 3: Góðska 40 stig + vektaður tímaprísur 42,6 stig = samlað meting 82,6 stig.

Veitarin, ið hevur sent inn tilboð 2, vinnur útboðið.

## Innlating og tíðargongd

| Dagur | Hending | Viðmerking |
|---|---|---|
| Mánadag  4. september 2023 | Útboðið lagt út á Keypsportal.fo | Spurningar kunnu sendast skrivliga til Hergeir P. Vang, hpv@taks.fo |
| Mikudag 13. september 2023 kl. 12.00 | Seinasta freist hjá veitarum at senda spurningar til útboðið | Spurningar og svar kunngerast, í tann mun til ber, leypandi á www.keypsportal.fo |
| Mikudag 13. september 2023 kl. 16.00 | Skjal við øllum spurningum og svarum verður kunngjørt á Keypsportal.fo | www.keypsportal.fo |
| Týsdag 26. september 2023 kl. 12.00 | Freist at senda inn tilboð fer | Tilboð skal sendast við telduposti á taks@taks.fo Heitið á teldupostinum skal vera "Útboð eftir Outsystems mennarum". Tilboð, ið koma inn eftir freistina, verða ikki viðgjørd. |
| 27. – 29. september | Innkomin tilboð verða viðgjørd og vinnari/vinnarar funnir.<br><br>Treytað av at verklagslóg til kt-skipan til barsilsgrunnin verður samtykt í Føroya Løgtingi. | TAKS tilskilar sær rættin at seta seg í samband við tilboðsgevarar, við útdýpandi spurningum viðvíkjandi tilboðnum. |
| Skjótast gjørligt eftir at verklagslóg er samtykt | Vinnandi tilboð/ini verða eftir undirskrift kunngjørd í seinasta lagið eina viku aftaná verklagslógin er samtykt. | www.keypsportal.fo |